# Vinnulívið

FRANK JACOBSEN



Í Tórshavnar Kommunu eru fleiri smá vinnuvirki, sum hava trong viðurskifti, tí fíggjarliga orkan ikki er stór. Eitt nú lastbila- og busseigarar hava einki stað, har teir trygt kunnu seta síni vinnuamboð. Eisini eru viðurskiftini viðv. hølum og umstøðum annars, ikki nøktandi.

Eg vil virka fyri, at Tórshavnar Kommuna ger eitt umhvørvi, har vinnurekandi kunnu leiga eitt øki at seta síni vinnuamboð. Umstøður skulu vera til smávegis viðlíkahald osfr.

Vilt tú hava ein, sum lurtar eftir tær? Vilt tú hava ein, sum arbeiðir fyri teg? So vel meg. Tú finnur meg á lista H.

# Nei til "kinamúr"!

KRISTINA TOFTEGAARD LARSEN
valevni á kvinnulistanum



Fuglafjørður er ein spennandi og ríkur býur, ið á mangan hátt skarar fram um aðrar. Vit eiga eitt støðufast vinnulív, ið fáar aðrar kommunur kunnu samanbera seg við. Eitt fjølbroytt útboð av virksemistilboðum fyri likam og sál, so sum ítrótt, tónleik og samkomulív. Fólkatilfeingið er ríkt og fjølbroytt, og býurin eigur fleiri listafólk, ið seta sín dám á at skapa okkara mentan.

Hóast hetta ríka tilfeingi, so havi eg tað fatan, at vit ikki mugu gera eins og kinesararnir gjørdu á sinni,- múra okkum inni, við vanda fyri at enda sum minsta og primitivasta kommuna í landinum. Landspolitiskt verður arbeitt fyri at flyta fleiri og fleiri málsøki út á kommunurnar. Tá verða tær størstu kommunurnar tær sterkastu, og tað er ikki óhugsandi, at tær smáu tá verða tvingaðar í eina samanlegging.

Eitt málsøki, sum longu er lagt út til kommunurnar at umsita, er dagstovnaøkið, og tað er ikki óhugsandi, at málsøkini skúlamál og eldramál verða tey næstu økini, ið verða flutt út til kommunurnar at umsita. Hesi mál eru oftast tung fíggjarliga, og krevja lutfalsliga stóra fyrisiting eisini.

Eitt er givið, at tess størri kommuneindin er, tess lættari verður tað at skipa fyri stórum og áhugaverdum arbeiðsumhvørvum, sum er ein fortreyt fyri at fáa væl útbúgvin starvsfólk at støðast í nærumhvørvinum – ella kommununi.

Kommunusamalegging er ein styrki.

Set x við K.vinnur

# Tinghúsið á hjalla er ein sukse

ELIN LINDENSKOV
Javnaðarflokkurin



Tá vit tóku við býráðsleiðsluni, settu vit okkum sum mál at skipa ein endurnýtsluhandil. Ein handil har borgarin kundi lata brúktar lutir til endurnýtslu, heldur enn brenna teir. Vit settu okkum somuleiðis fyri, at skipa fleiri vard størv í kommununi.

Vit settu okkum í samband við Alv fyri at kanna, hvussu vit á besta hátt kundu skipa ein endurnýtsluhandil við vardum størvum. Úrslitið er "Tinghúsið á hjalla" sum læt upp í umhvørvisvikuni 2008. Tinghúsið á Hjalla verður rikið av Alv, sum eisini fær ágóðan av inntøkunum. Brennistøðin letur hølir og pláss til endurnýtslubingjuna. Eg gleðist um, at hetta átakið hevur fingið sera góða undirtøku. Eg vil framvegis virka fyri øktari endurnýtslu býnum og umhvørvinum at frama.

# Uppsagnirnar á Føroya Tele

JÁKUP DANIELSEN



Í nevndini í Føroya Tele situr ein persónur, sum javnan hevur verið frammi og hartað virkis- og bankaleiðslur fyri bæði líkt og ólíkt. Við stórum posa av eftirklókskapi hevur viðkomandi greitt øllum Føroya fólki frá, hvussu illa fyritøkur hava verið riknar og hvussu væl hann sjálvur veit hvussu fyritøkur, reint teoretiskt, eiga at verða riknar. Men satt at siga, tá man koyrir bil við sólbrillum í oysandi regni, so kann man ikki síggja klárt, tí nú uppliva vit, at fyritøkan sum viðkomandi er nevndarlimur hjá, er komin so mikið illa fyri, at neyðugt er at uppsiga 28 fólkum stutt undan jólum 2008.

Hesi fólkini hava eitt til felags og tað er, at tey nú á ein ella hátt eru offur fyri vánaligum kappingarevnum. Kappingarevnum, sum fyritøkan hevur havt í ólukkumát og sum nú, hetta síðsta árið, hevur spælt sær av hondum fyri síðani at verða komin so illa fyri, at fólk við stórt sæð lægstu lønunum, fáa uppsagnarbrævið í jólagávu.

Og í hesum forbrenda eftirklókskapinum, kann eg siga, at hetta kemur ikki óvart á, tí longu fyri einum ári síðani var væntandi, at við tí stýringini sum var, so kundi tað enda galið og Føroya Tele, sum fyritøkan sum gjørdi nógv um seg í føroyska samfelagnum, sovnaði spakuliga burtur.

Væl kann verða, at spælireglurnar sambært sáttmálum eru fylgdar, men tað er so avgjørt ikki í lagi, at man fer eftir starvsfólkum við lægstu lønunum og kanska við ringastu møguleikunum at fáa annað arbeiði. Tað er ein háðan móti sínum meðmenniskjum og vánaligum leiðsluevnum, at fara soleiðis fram.

So kunnu tit kallað tað fyri rationaliseringar, bygnaðarbroytingar og tøkniligan framburð sum orsøk fyri at uppsiga hesi 28 fólkini. Tað er ein slutur fyri ein slatur og allarhelst kryddraður við einum stórari skeið av ósannindum, tí um tað er at trimma fyritøkuna, við júst at siga hesum fólkunum upp, so kunnu tit kallað meg mads.

# Selatraðarvegurin

MEINHARD JACOBSEN
Kolbeinagjógv



Nú hendi tað so enn einaferð, at eitt kavaruddingarakfar hjá Landsverk rendi seg fastan á Selatraðarvegnum.

Í kavastorminum mánadagin í farnu viku rendi ein av kavaruddingarmaskinunum hjá Landsverk seg fastan oman fyri Kolbeinagjógv.

Vegur smalkar um eina metur her, og onki skelti boðar frá hesum.

Hjá Landsverk eru tey fleiri fer gjørd varug við, at óhapp henda júst her.

Svarið frá Landsverki er tað sama hvørja fer: at tað er "kleyvarskapur" at koyra seg útav vegnum her.

Nú fór so ein maskina hjá Landsverk útav vegnum á júst sama stað – hvør feilurin nú er, kann lesarin sjálvur meta um.

At kavaruddingarakfør renna seg føst og fara útav, tá Selatraðarvegurin verður ruddaður, er ein afturvendandi trupulleiki.

Tað er at kalla á hvørjum ári, at akfør hjá Landsverk renna seg føst tá ruddað verður.

Tað er ikki nøkur løtt uppgáva hjá ókunnufólki, at rudda kava á illa dagførda og sera vánaliga Selatraðarvegi, ið gongur av Lághálsum til Selatraðar.

Vegurin er skiftivís smalur og breiður, og hartil er avmerkingina út av lagi vánalig. Koyrir tú av Lághálsum, og so langt norð tú sleppur eftir Selatraðarvegnum, er bara okkurt hissini ferðsluskeltið at síggja. Tað er ikki eitt einasta skelti, ið boðar frá at vegurin smalkar, hóast vegurin skiftivís breiðkar og smalkar, fyri hvørjar hundrað metur til at kalla allan vegin til Selatraðar.

Tað er vónleyst hjá ein fremmandum at rudda kava, í so ringum líkindum sum tey vóru hendan mánadagin.

Um tað er tí, at førararnir á kavaruddingarakførum ikki hætta sær at rudda Selatraðarvegin, ella tað eru aðrar orsøkir skal ikki verða sagt her, men tað er ein sannroynd, at kavarudding á Selatraðarvegnum, verður forsømt í stóran stíl.

Tað er meira reglan enn undantakið, at kavaruddingarmaskinurnar hjá Landsverk venda sunnarlaga á Strondum, har vegurin smalkar til tað, hann er restina av teimum umleið 10 kilometrunum til Selatraðar.

Tað kemur fleiri ferðir fyri á hvørjum vetri, at fólk í bygdunum við Selatraðarvegin (Kolbeinagjógv, Morskranes og Selatrað), ikki sleppa til arbeiðis, og børnini ikki í skúla orsaka av væntandi kavarudding.

Selatraðarvegurin var gjørdur av smágróti og eyri, fyrrapartin og miðskeiðis í farnu øld. Síðani er at kalla onki gjørt fyri at betra um koyriumstøðurnar, og er vegurin í dag als ikki tíðarhóskandi.

Eftir øllum at døma hevur hesin vegur ongan góðan hjá teimum, ið skula umsita vegin, og enn minni hjá teimum, ið játta skulu pening til nútímansgerð av hesum 60 – 70–ára gamla vegi. Asfalt er lagt á nakrar ferðir, og har ikki eyrur er undir asfaltinum, er ber mold. Tað sigur seg sjálvt, at vegurin ikki kann halda til tey akfør, vit í dag hava. Vegurin er skrædnaður í fleir støðum og er ikki tryggur at ferðast á, ja hann er beinleiðis vandamikil fyri tung akfør.

Hjá okkum, ið ferðast dagliga eftir hesum veg, er spurningurin ikki "um" vanlukkan hendir, men "nær" hon hendir. Tað er bara at vóna og biðja til, at tað ikki verður skúlabussurin ella ein bussur við 50 ferðafólkum til Selatraðar, ið verður tann vanlukkan rakar.

Á strekkinum av Lághálsum og norður til Selatraðar, eru onkrar hissini grótrúgvur tveittar og skal hetta eitast at betra um vegin.

Tey sum dagliga ferðast her, eru alt annað enn samd við hesum.

Seinasta "stuntið" var at tveita nakrar hundrað rúmmetrar av grótið – tí peningur var til avlops aðrastaðni beint fyri árslok – ímillum Morskranes og Selatrað. Fyri at fáa tilfari hagar, skuldu stórir og tungir bilar koyra eftir tí vánaligasta parti av Selatraðarvegnum, og við tí úrslitið at tann frammanundan vánaligi vegur gjørdist enn verri.

Hetta arbeiði liggur nú í hálvum gekki og er bara til tað verra.

Fyri tveimum trimum árum síðani var tað sama gjørt á Steffanstanga – sunnan fyri Morskranes. Hetta arbeiðið liggur eisini í hálvum gekki, og er sum er ikki til nakra verðsins nyttu.

Fólk standa spyrjandi? Hví verður peningurin ikki nýttur við eitt sindur av skili, og hví verður ikki byrjað frá einum enda, og arbeiðið gjørt liðugt so hvørt?

Sum nú er liggja fleiri pettir í hálvum gekki, og er hetta bæði synd og skomm fyri tey, ið skula eitast at standa fyri.

Var alt hetta tilfar nýtt at breiðka vegin, og at gera vegin av nýggjum frá endanum av Strandavegi, høvdu vit í dag góða veg, hálva leið til Selatraðar. Tað hevði verði tað einasta rætta. Í staðin hava vit í dag ein ónýtiligan veg, líka av Strondum til Selatraðar.

Fyri 20-30 árum síðani varð borað oman fyri vegin frá Lághálsum og einar 500 metur norðeftir, við tí fyri eyga at breiðka vegin – enn er onki meir hent við hesum arbeiðið. Aftur her standa fólk spyrjandi?

Ongin av teimum ið her búleikast, krevur at Selatraðarvegurin skal gerast til ein "autobahn".

Men tað er væl ikki ov mikið kravt, at vegurin verður nútímansgjørdur frá einum enda av og at arbeiðið verður gjørt liðugt so hvørt.

Tað verður nógv tosa um at betra um sambandið til bygdirnar við tunlum, brúm, nýggjum ferjum og hvørt av sínum. Alt hetta fyri at bøta um møguleikarnar og fyri at fáa fólkið at trívast í teimum smærru bygdunum.

Hetta er eisini galdandi her. Um ikki okkurt munagott verður gjørt við Selatraðarvegin, er ikki hugsingur um at fáa fólk at støðast í hesum smáu bygdum.

Tað er mín vón, at tey røttu viðkomandi síggja tað neyðuga í, at betra um henda veg og at peningur verður játtaður til endamáli.

At enda vil eg heita á komandi kommunustýrið fyri Sjóvar kommunu, um at vísa meir vilja og áræði, enn fráfarandi kommunustýri at streingja á landsmyndugleikarnar um at gera nakað við Selatraðarvegin.